# Skal vera slætt borð

**Formaðurin í Lærarafelagnum vil ikki hoyra talan um, at sáttmálin hjá maskinmeistarunum skal hava nakað við teirra samráðingar at gera**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Semjan millum SEV og Maskinmeistararnar eigur ikki at hava nakra ávirkan á sáttmálasamráðingárnar í heyst.

Hetta heldur formaðurin í Føroya lærarafelag, Magnus Tausen. Hann heldur málið um maskinmeistararnar og SEV og teirra samráðingar vera púra hvør sítt.

– Vit vilja ikki oyðileggja nakað fyri maskinmeistararnar. Hvat teir fáa frá SEV hevur einki at gera við okkara samráðingar, sigur Magnus Tausen.

– Hvat arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnir á tí privata samdust um fyrr í ár leggur heldur ikki støðið hjá okkum. Tað er púra burturvið, at aðrir partar skulu kunna áseta okkara prosentkarm, sigur Magnus Tausen.


*Magnus Tausen*

Við hesum sipar formaðurin í Lærafelagnum eisini til útsagnirnar hjá Bárði Nielsen um, at fakfeløgini eru samantvinnaði. Gevur tú tí eina eitt prosent; so skulu hini eisini hava eitt prosent.

– Okkara samráðingarnar eiga ikki at vera tengdar at øðrum samráðingum á tí privata økinum, sigur Magnus Tausen.

– Skal Bárður Nielsen hava ein nullloysn, so skal tað koma í samráðing og ikki sum krav frá byrjan. Tá er ikki talan um samráðing, men um diktat. Og feløgini samráðast ikki um nullloysnir, sigur Magnus Tausen.

### Avvápnað

Tað hevði valla endað við ramaskríggjum kring landið, um lærarnarir á hægstu summartíð fóru í verkfall.

– Vit eru avvápnaðir í løtuni, so vit hava ikki hugsað um at farið í verkfall, sigur Magnus Tausen.

Føroya lærafelagið hevur verið í samband við Starvsmannafelagið og onnur fakfeløg. Og feløgini hava avgjørt at hittast í summar. Men einki umfatandi verkfall ella líknandi er í umbúna. Feløgini hava avgjørt og tosa saman, og formaðurin hjá lærarunum heldur, at feløgini hava nógv at tosa um. Og tað er ikki bert løn.

Magnus Tausen leggur eina við, at hansara felag ikki heldur tað verið í lagi, at løgtingið leggur upp í á tílíkan hátt.

– Vit eru harðliga ímóti tí, sum hendi mikudagin. Men tað er ikki nógv, ið vit kunnu gera við tað, sigur Magnus Tausen.

### 2,4% er nullloysn

– Ein nulloysn er ikki minni enn 2,4% í lønarhækkan. Vanliga hava feløgini, ið samráðast við tað almenna, fingið tí somu lønarhækkan, t.e. somu prosentvísu øking í lønini. Og hesum kann tað væl hugsast, at tað aftur hesaferð endar við.

- Starvsmannafelagið hevur sum størsta felag oftani lagt støðið og hini fylgt eftir. Tí er tað eisini týdningarmikið, at feløgini tosa saman um krøvini, so at tey kunnu verða samd um felags krøv m.a. felags prosentkarm sigur Magnus Tausen.

*Men merkir tað, at Lærarafelagið kundi hugsað sær, at feløgini samráddust undir einum?*

– At øll feløgini samráðast undir einum er ikki neyðugt, men feløgini kundu í felag fingið sett lønarkarmin t.d. við at ein bólkur umboðandi feløgini tók hetta á seg.

Føroya lærarfelag hevur eina høvuðsavtalu, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur ført fram ynski um at fáa fleiri av.

– Høvuðsavtalan varð gjørd av neyð, men hon hevur hevur víst seg at rigga rímiliga væl í friðartíð, men hon er eitt haft um beinið, tá ið stríð tekur seg upp sigur Magnus Tausen sum setur sítt álit á, at felags skipan at loysa trætur kann verða skipað fyri allan arbeiðsmarknaðin.

Hann sigur seg væl skilja sjónarmiðini um, at 32 fakfeløg innan almenna sektorin er ov nógv. Men tað er veruleikin, og tað eiga myndugleikarnir at hava virðing fyri sigur hann.

– Fólk eru góð við sítt fak, og tað er ein styrki fyri samfelagið, sigur Magnus Tausen.

# Verkfall hevði rakt tey veikastu

**– Vit áttu nokk at verið farin í verkfall, men tað ber ikki til mitt í summarfrítíðini, tá bert tey sjúkastu liggja inni og mestsum bert bráfangisarbeiði verður gjørt, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna fyri Sjúkrarøktarfelagið**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Eisini forkvinnan fyri Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar er í øðini inn á løgtingið fyri at lóggeva maskinmeistararnar hjá SEV aftur til arbeiðis. Felagið finnist hvassliga at løgtinginum í einari yvirlýsing.

*Men hví fóru sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki í verkfall?*


*Jana H. Dalsgaard*

– Vit áttu nokk at verið farin í verkfall, men tað ber ikki til at savna nevndina, sigur Jana Dalsgaard.

Fleiri nevndarlimir eru í summarfrí, og tað forðar tískil felagnum at taka endaliga støðu til spurningar um verkfall.

– Men ein arbeiðsstøðgur nú hevði kortini ikki komið uppá tal tí í summarfrítíðini eru tað bert tey sjúkastu sum liggja inni, og mestsum bert bráfangisarbeiðið ið verður gjørt, so tað hevði rakt tey veikastu og tað vilja vit ikki, sigur Jana Dalsgaard.

Men felagið fylgir væl við, hvat hendir í málinum.

Forkvinnan sigur harumframt, at felagið ikki ætlar at fylgja tilmælinum hjá Bárði Nielsen um høvuðsavtalur.

Felagið hjá fyrrverandi sjúkrasystrunum ætlar sær at luttaka á teimum fundum, ið fakfeløgini í felag fara at fyriskipa, men í løtuni er einki ítøkiligt í umbúna.

Hon vil heldur ikki siga nakað um, hvat útgangsstøðið hjá felagnum verður til sáttmálasamráðingarnar í heyst.

### Paralelt við gamalt stríð

Hjá Janu H. Dalsgaard leita tankarnar fáar mánaðir aftur í tíðina, tá stríð var millum landsins myndugleikar og sjúkrarøktarfrøðingar um umleggingar á Landssjúkrahúsinum. Hon metir, at landsins myndugleikar misbrúka friðarskilduna.

– Málið á Landssjúkrahúsinum er eitt dømi um-, at tað ber til hjá arbeiðsgevaranum uttan so mikið sum at tosa við ein part í einum máli, við hjálp frá Landsstýrinum, at gera allar møguligar og grundleggjandi broytingar í friðartíð, har vit einki kunnu gera, sigur Jana H. Dalsgaard.